2 arin
Telefon: 311820 Fax: 314720 E-mail: post@sosialurin.fo

# Guardian undir nýtt tiltak

**FJØLMIÐLAR.** Enska blaðið, The Guardian, fer nú undir samstarv við Xerox, sum er kent fyri at gera kopimaskinur. Ætlanin er at geva The Guardian út kring alt Europa. Hetta skrivar norska internetavísin digi.no.

Í dag verður The Guardian prentað á prentsmiðjum í Onglandi og Týsklandi, og hetta merkir, at blaðið kemur ikki fram til europeiskar stórbýir fyrr enn út á dagin.

Nýggja verkætlanin, sum verður royndarkoyrd í Danmark og Grikkalandi, fer at hava við sær, at The Guardian kemur út áðrenn klokkan sjey um morgunin í hesum londum – júst sum heima í Bretlandi.

The Guardian fer at koma út í ymiskum útgávum í europeisku londunum, og sambært teimum, sum standa fyri hesum arbeiði, kann royndin fara at kollvelta háttin at kollveltingina og útberingina av bløðum.

– Hetta fer at geva vanligu bløðunum møguleikar at kappast við internetbløð, tá talan er um fesk tíðindi, sigur ein talsmaður fyri Guardian.



# Beatlarnir út við bók

**TÓNLEIKUR.** Teir tríggir Beatlarnir, sum eru eftir á lívi, hava skrivað endurminningar, sum koma út í bók.

Sambært blaðnum, Sunday Telegraph, hava Paul McCartney, Ringo Starr og George Harrison arbeitt í seks ár við bókini, sum fær navnið »Beatles Anthology«.

Bókin verður 360 síður, og verður givin út í Stóra Bretlandi og USA í heyst, og væntað verður, at bókini verður umsett til eina rúgvu av øðrum málum. Inntøkurnar frá søluni verða býttar javnt millum teir tríggjar rithøvundarnar og einkjuna eftir John Lennon, Yoko Ono. Hon hevur ikki verið við í arbeiðnum við bókini.

Sambært Sunday Telegraph fara ein rúgva av myndum at verða við í bókini, sum ongantíð áður hava verið frammi, og teir fara eisini at koma við upplýsingum um skilnaðin í 1970, sum ikki áður hava verið frammi.

# Heimsins dýrasti sangleikur frumsýndur

**LEIKLIST.** Í gjár varð frumsýningin av heimsins dýrasta sangleiki í Neuschwanstein í Suðurtýsklandi. 1400 fólk vóru boðin við til frumsýningina av leikinum, sum varð framførdur í einum nýbygdum leikhúsið í Alpunum.

– Frumsýningin verður ein dreymur, lovaði leiðarin av Ludwig Musical AG, Felix Maria Roehl, undan sýningini, sum hevur fingið tær stóru yvirskriftirnar í týsku pressuni.

»Ludwig II – longsulin eftir paradísi«, sum leikurin eitur, verður framførdur einar 400 ferðir fram til januar mánaða næsta ár. Eini 450.000 fólk fara at hyggja eftir leikinum, og longu nú eru 90% av atgongumerkjunum longu seld. Prísurin er millum 85 og 230 D-Mark.

Sølufremjandi herferðin fyri leikinum hevur verið stórsligin, og tað eru ikki minst ferðafólk úr USA og Japan, sum eru millum áskoðararnar. Í hesum sambandi fáa útlendskir áskoðarar tekstirnar á sínum egna máli, so tey fáa fylgt við í leikinum.

**Subject:** Teldubræv
**Date:** Wed 5. Apr. 2000
**To:** post@sosialurin.fo
**From:** fgaini@iname.com
**Reply to:** fgaini@iname.com

TELDU-POSTURIN

# Le Monde

Einaferð var París heimsins nalvi, men onki varir. Høvuðsstaðurin framum allar er eitt yndismál ferðamanna, men vísindaliga og mentanarliga er staðurin bara *ein* í rúgvu av systrum á foldum. London, Los Angeles, Sao Paulo og Bombay eru í ymsum málum meira týðandi í kapitalistisku heimsskipanini ár 2000. Hugfrøðin úr átjandu øld og franska kollveltingin tykjast hugtaka ferðafólk og søgufrøðingar meira enn politiska og vinnuliga úrvalslið vesturheimsins, tí Voltaire og Diderot eru als ikki *in* fyri tíðina.

París er hálvtómur leikpallur, ið minnist sínar litføgru hetjur við framtíðarhugsan og stríðsanda, ið ikki vóru raktir av nihilismu og sosialari líkasælu. Leiktjaldið er prýðiligt, men lítið og onki hendir á sjálvum pallinum. Stríðið fyri frælsi og menniskjarættindum fyri øll er av teim vitbornu, ið skriva og stýra samfelagskjakinum, avloyst av fløkjasligum og sera óítøkiligum diskursi um franska málið og postmodernismu. París blómar enn, hóast alt, men hann hevur ikki tað altjóða mæti sum fyrr, tá hvør evropeiskur mentamaður við virðing las Montaigne og Descartes á fronskum.

Málsliga hevur franskt langt síðan mist leiklutin sum høvuðsmálið hjá sendiráðharrum, aðalstætt og rithøvundum, hóast fransksinnað hava heilt aðra áskoðan. Í Fraklandi verður árliga heimsráðstevna teirra fransktalandi, við Boutros Boutros-Ghali í formannssessinum, sæð sum felagsskapur á hædd við S.T. Gamla hjálandið Vietnam er týdningarmikið umboð á ráðstevnuni, men sannleikin er, at gomul yvir 70 ár skilja franskt meðan hini duga enskt. Og í nógvum menningarlondum eru tey fransktalandi ein avmarkaður bólkur í landsins lítlu búskaparligu yvirstætt, so ongin ivi kann vera um, at enskt er *latín í okkara tíð*.

Dygdarblaðið *Le Monde* er av heimsins mest álítandi og virdu. Le Monde - Heimurin - er skrivaður á fronskum, men tilfarið er fjølbroytt og úr øllum heimspørtum. Skrivihátturin er sakligur og uttanveltaður, á jøvnum høgum støði, við avbera góðum greiningum av politiskum, búskaparligum og mentanarligum viðurskiftum. Einastandandi nágreiniligir tekstir um politiskar kreppur í Afrika, um hungursneyð í Suðurasia, um skipað brotsmannalið í Russlandi, um seinasta aðalfundin hjá G7-londunum og so framvegis, fylla hvønn dag stóru blaðsíðurnar í Le Monde. Blaðstjórin Columbani, hevur stórt lið av evnaríkum tíðindamonnum, atfinnandi og hugsandi, sum eygleiða týðandi hendingar og avgerðir - allastaðni -, teir síðani lýsa í blaðnum. Le Monde, við høvuðssæti í París, hevur meira tilfar enn flest onnur dagbløð, og lýsingarnar og myndirnar eru fáar og smáar. Reinur tekstur fyllir nærum alt plássið, og tí kann Le Monde virka turrislig og torskild hjá nógvum.

Le Monde verður endurgivin í fjølmiðlum kring allan heim, og hvør sendiráðharri - í minsta lagi teir fransktalandi - kannar regluliga sjónarmiðini hjá Le Monde fyri at fáa betri innlit í hendingar í altjóða politikki. Tá ið til dømis afrikanskur statur verður fyri blóðugum *coup d´état*, so skriva flestu dagbløðini í Evropa stutta frágreiðing, ið AP ella Reuter hevur sent teimum. Le Monde lýsir altíð hendingina við blaðfólki á staðnum, og sum oftast sleppa serfrøðingar eisini framat at geva sína heildarmynd av støðuni. Blaðið er sera álítandi og blæsir ongantíð nakra gølu upp uttan góða grund! Le Monde minnir um týska *Die Zeit* og bretska *The Independent*. Amerikanska *Herald Tribune* verður eisini roknað sum altjóða dygdarblað. Tað er drúgt at lesa eina heila útgávu av Le Monde, og tað er eisini púra óneyðugt. Tíðindini eru býtt upp eftir landi/heimsparti og tema, soleiðis at lesarin lættliga kann finna áhugamál síni og so velja restina frá.

Le Monde broytist ikki nógv, tíbetur, og heldur uppá klassiska stílin í tíðindaarbeiði, við upplýsing og objektivari vitan sum síni mál. Le Monde er sjálvandi litað av at vera franskt vinstrahalt blað, men blaðið er eisini fyrimyndarligt. Ein fronsk fyrimynd kann man siga. Greinar, sum hava meira um rithøvundan enn um *hini*, tey, ið hon í veruleikanum skal lýsa, sleppa ikki á prent hjá Le Monde. Blaðið kemur hvønn morgun á marknaðin, á tremur við tíðindum úr øllum heiminum, tí hugfrøðin í blaðstjórnini hevur altíð verið universalistisk og humanistisk. Blaðfólkið finst at órætti bæði heima og úti, men leypur ongantíð framav, tí tað kann bara skaða blaðið - og lesaran, sjálvandi.

*Tout le monde* merkir *øll fólkini*, og blaðið fylgir fronsku siðvenjuni, at taka allan heimin við í ritum sínum; ein arvur frá upplýsingartíðini. Á skrivstovunum hjá Le Monde í París, Kongo og Kina halda tey á við tí arbeiði, sum byrjaði við *alfrøðini* hjá Diderot og øðrum heimspekingum í átjandu øld. Alt skal festast á blað...men helst á fronskum. Le Monde er blómandi fyrimynd úr landi, ið var heimsmiðdepil fyri list og vísind, men við ógreiðum tjóðsamleika ár 2000.

**Firouz Gaini**
**Paris**





## FØÐINGAR

29. mars fingu Henny Guðjónsson og Ingi Simonsen, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3900 gr.

29. mars fingu Tóra og Jón Johansen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3700 gr.

30. mars fingu Hildur Poulsen og Alfred Joensen, Norðskála, eina dóttir. Hon var 54 cm. long og vigaði 4200 gr.

30. mars fingu Lis og Jón Viðstein, Hoyvík, eina dóttir. Hon var 52 cm. long og vigaði 3400 gr.

31. mars fingu Bergljót Enni og Heri Jakobsen, Vejle, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3750 gr.

2. apríl fingu Annika Mikkelsen og Sæbjørn B. Nielsen, Hoyvík, ein son. Hann var 56,5 cm. langur og vigaði 4550 gr.

2. apríl fingu Molly Jacobsen og Magni Johannessen, Toftir, eina dóttir. Hon var 56 cm. long og vigaði 4100 gr.

3. apríl fingu Eron Debes og Sigvør Magnusdóttir, Miðvágur, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4300 gr.

3. apríl fingu Beinta Sørensen, Tórshavn og Didier Repond, Sweitz, eina dóttir. Hon var 55 cm. long og vigaði 3700 gr.

3. apríl fingu Margretha Dam og Brynjer Gregoriussen, Argir, ein son. Hann var 49 cm. langur og vigaði 2710 gr.

3. apríl fingu Guðrun og Oddur Ejdesgaard, Eiði, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4200 gr.

3. apríl fingu Tania Ørvarodd og Gunnleif J. Bjartalíð, Klaksvík, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 2715 gr.

4. apríl fingu Anna Jacobsen, Runavík og Hans Petur Joensen, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 55 cm. long og vigaði 3420 gr.

4. apríl fingu Anne Marie Norby og Heini Joensen, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3000 gr.

5. apríl fingu Oddbjørg Niclasen og Jógvan Magnussen, Sørvágur, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3600 gr.

5. apríl fingu Andrea og Eydnar á Roykheyggi, Runavík, ein son. Hann var 58 cm. langur og vigaði 4300 gr.

5. apríl fingu Bjørg og Pól Jacobsen, Norðragøta, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3890 gr.

6. apríl fingu Tanja Anthoniussen og Arnhold S. Simonsen, Fuglafjørður, eina dóttir. Hon var 55 cm. long og vigaði 3750 gr.



## ANDLÁT

30. mars:
**Oddvør Jónson,** Fuglafjørður, 64 ár
**Kaj Eyvindsson,** Trongisvágur, 56 ár
31. mars:
**Hans Jacob Fugløl,** Viðareiði, bús. í Godthåb, 65 ár
1. apríl:
**John Simonsen,** Sørvágur, 69 ár

## Læknavaktir

**Tórshavn:**
*Læknavaktin* tlf. 310033.

**Eysturoy:**
*Leygardagin 8. apríl:* Pól Johs. í Horni, tlf. 444038
*Sunnudagin 9. apríl:* Kári Rasmussen, tlf. 447010

**Norðoyggjar:**
Magnus Magnussen, tlf. 455451

**Vágar:** tlf. 332413

**Suðuroy (norður):**
Tlf. 371560

**Suðuroy (suður):**
Tlf. 373030

**Tannlæknavakt,** Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13–14. Tlf. 314544.


# Studningar til landbúnaðin

***Allur studningur til landbúnaðin er treytaður av, at móttakarin hevur landbúnað sum vinnu, og harav er bókhaldsskyldigur og MVG-skrásettur.***
***Út frá hesum verður studningur bert latin umsøkjarum, sum hava latið skrivstovu jarðarráðsins MVG-skrásetingarskjal sítt fyri inniverandi ár og góðkendan roknskap fyri árið frammanundan.***
***Umsóknarfreistirnar skulu haldast. Árstíðarásettar freistir verða lýstar í bløðunum. Annars er mannagongdin viðv. teimum ymisku studningunum lýst niðanfyri.***

**NEYTAKJØT:**
Umsóknarfreistin er ein mánaða, frá tí at neytið er dripið. Tá allir umbidnir upplýsingar fyriliggja, verður studningurin avgreiddur so hvørt.

**STRÁFÓÐUR:**
Søkjast kann alt árið. Umsókn skal sendast, tá ætlan fyriliggur, og áðrenn arbeiðið byrjar. Studningurin verður avgreiddur, tá brunnurin er liðugur, sýnaður og góðkendur.

**SÚRHOYSBRUNNAR:**
Søkjast kann alt árið. Umsókn skal sendast, tá ætlan fyriliggur, og áðrenn arbeiðið byrjar. Studningurin verður avgreiddur, tá brunnurin er liðugur, sýnaður og góðkendur.

**RÆTTIR:**
Søkjast kann alt árið. Umsókn skal sendast tá ætlan fyriliggur, og áðrenn arbeiðið byrjar. Studningurin verður avgreiddur, tá arbeiðið er liðugt og góðkent. Studningurin verður bert latin til rættir við vaskibrunni.

**VELTING:**
Ætlanirnar skulu fráboðast við eini umsókn áðrenn 1. mai, og verða góðkendar fyri at studningur kann verða settur av til fráboðaðu arbeiðini. Veltað lendið skal vera sýnað og góðkent, áðrenn studningur verður avgreiddur. Verður arbeiðið ikki liðugt, er neyðugt at søkja umaftur árið eftir. Veltistudningur verður avgreiddur einaferð árliga fyri alt landið í senn.

**KØSTAR:**
Søkjast kann alt árið tá ætlan fyriliggur. Studningurin verður avgreiddur so hvørt arbeiðið er liðugt og góðkent.

**SEYÐAKJØT:**
Hesin studningur er afturbering av goldnum meirvirðisgjaldi. Umsóknin skal sendast jarðarráðnum samstundis, sum meirvirðisgjaldið verður goldið T & S fyri farna ársfjórðingin, soleiðis at hon er okkum í hendi 20. í sama mánaði. Sostatt er seinasta freist:
okt. ársfj. 20. feb.
jan. ársfj. 20. mai
apr. ársfj. 20. aug.
juli ársfj. 20. nov.
Við umsóknini skal uppgerð og kvittan fylgja við. Studningurin verður avgreiddur so hvørt.

**MJÓLK:**
Henda studning avgreiðir jarðarráðið sambært uppgerð til MBM, sum lutar studningin út eftir innvigaðu mjólkamongdini til virkið.

***Umsóknir til studning skulu altíð vera skrivaðar á umsóknarbløð, sum fáast á skrivstovu jarðarráðsins tlf. 311180. Á hesum umsóknarbløðunum eru prentaðar studningstreytirnar.***
***Umsóknir, ið eru skrivaðar á eldri umsóknarbløð, sum ikki eru galdandi longur ella á ljóstak av umsóknarbløðum, verða ikki góðkendar.***
***Upplýsingar um studningsupphæddir o.a. fáast við at ringja tlf. 311180.***



**FØROYA JARÐARRÁÐ**
Postrúm 50 • R. C. Effersøesgøta 4 • 110 Tórshavn • tlf. 311180 • fax 311185 • teldupostur: fj@fj.fo
Telefontíð mánadag-hósdag 08.00-16.30 tó fríggjadag 08.00-16.00
(í døgurðatímanum er stongt)


## Prógv

**Jákup Arnhold Lambaa, Fuglafjørður hevur lokið yrkisútbúgving sum bakari. Lærupláss: Breyðmolin, Fuglafjørður.**

**Jóhann Simonsen, Tórshavn hevur lokið yrkisútbúgving innan heildarfyrisiting (speditión og shipping). Lærupláss: Eimskip í Føroyum.**

## Gullbrúdleyp

**Leygardagin 15. apríl kunnu hjúnini Edith og Óli Sørensen í Húsavík halda gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í ungmannafelagshúsinum kl. 19.**

**Sunnudagin 16. apríl kunnu hjúnini Julina og Andrias Joensen, Skála, halda gullbrúdleyp. Vælkomst verður hjá soninum Jóan Jákup Joensen, Skála, sunnudagin 16.4. frá kl. 15.**

## Brúdleyp

**Leygardagin 8. apríl giftast á Københavns Rådhus, Kate M. Davidsen, (dóttir Sigrun Midjord og Jógvan Davidsen) og Henning Kongsted.**
**Brúdleypsadr: Føroyahúsið, Vesterbrogade 17A, 1620 Kbh. V.**

**Tann 15. apríl kl. 15 vera Una Havgrímsdóttir Gaasedal úr Havn og Ásmundur Heinesen úr Klaksvík, vígd í býráðssalinum í Havn.**
**Vælkomst verður í róðrarneystinum á Argjum kl. 19.30. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið viðat koma, vera biðin at siga frá á 320344 og 457757 í seinasta lagi 9. apríl.**